# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Ása Ellingsgaard*
*Vágsheygsgøta 5*
*700 Klaksvík*

Loysunar-orðið: ............................................ **477**

Navn: ..............................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: .....................................................

### Loysnin frá seinastu viku
### Loysunarorðið: BULGARIA

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B | I | R | G | I | R | | V | E | N | J | I | N | G | | B |
| A | | E | E | | I | A | | | I | A | T | A | | F | A |
| R | L | | V | E | S | T | U | R | | N | A | K | N | A | R |
| N | I | K | I | T | A | | R | Á | S | | L | K | | | N |
| A | V | E | | I | N | R | I | | A | R | I | A | D | N | A |
| M | U | R | A | N | | A | A | | D | I | A | L | E | K | T |
| A | R | | N | | U | | S | K | A | L | | A | N | I | R |
| T | I | N | D | U | R | | | U | M | L | | N | G | | Ú |
| U | N | D | A | N | T | A | K | | | A | | G | | G | G |
| R | | | L | I | A | N | I | N | | R | O | A | R | | V |
| 476 | E | M | U | | G | N | A | G | S | | P | R | Á | T | |
| E | L | I | S | | Ø | A | | | N | Ó | A | | I | I | I |
| I | N | N | I | | R | R | R | | O | R | K | A | N | | N |
| L | A | K | A | | Ð | | | I | R | A | | T | | D | D |
| I | | A | | S | U | M | M | A | R | | G | L | E | R | I |
| F | E | R | Ð | A | M | A | N | N | A | S | K | I | P | | A |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** – *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** – *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***


*Rannvá H. Mortensen*

# Rannvá Holm Mortensen í Leikalund

Listakvinnan Rannvá Holm Mortensen, er 56 ára gomul og er fødd á Tvøroyri. Hon hevur nátturlig listarlig evnir og er sjálvlærd listakvinna.

Rannvá hevur luttikið á mongum ymiskum framsýningum, bæði í Føroyum og uttanlands, hon hevur sýnt síni listaverk fram í Føroyum, Italia, Íslandi, Danmark og í Spania.

Rannvá arbeiðir bæði við málningum, grafikki, kollasjum og skulpturum.

Framsýningin verður í Leikalund í Klaksvík í døgunum frá 6. oktober til 1. november. Ferniseringin verður fríggjakvøldið 6. okt. Kl. 19.00, og hevur Leikalund opið til kl. 23.00 hetta kvøldið.

# Lovorðini eru stór til Polaroid í Grønlandi

**Í vikuskiftinum sýndu føroyska Kristina Ougaard Sørensen og fýra grønlendarar leikin Polaroid! What's Realy Going On Around the North Pole í Nuuk. Grønlendsku miðlarnir lata sera væl at**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sýningarnar av leikin Polaroid! What's Realy Going On Around the North Pole í Nuuk í vikuskiftinum vóru sera væl mótiknar.

Í útvarpstíðindunum hjá KNR stóðu áskoðarar á rað fyri at lovprísa leikinum, ið fólk mettu vera bæði stuttligan og undirhaldandi.

Skoðsmálið hjá KNR er eat leikurin var "Eitt festfýrverk av einum leiki, á tremur við humor, absurdum dansi og ørum innføllum, sum undirhelt áskoðaran væl.

Ein áskoðari segði:

- Tað er fantastiskt at síggja ein sovorðnan leik, við kropsligum framførslum og innihaldi, ið fortíð og nútíð at smelta saman. Tað var ein inniligur tími.

Meðan ein av kvinnuligu áskoðarunum, segði

- Eg haldi, at hetta var stórsligið. Nógvur humor, seksualitetum, kvinnuligheit, driftum, tørvum og isolatión, alt avgreitt deiliga óhátíðarliga.

Ein áskoðari segði seg hava fingið gásarhold av leikinum.

Eisini í Siku News vóru einans lovorð. Her skrivaði ummælarin, at leikarar, pallmynd og ljóðmyndir fluttu teg til Norðurpólin, og at leikurin hevði megnað at kasta alla vanahugsan innan grønlendska leiklist av sær.

1000 fólk sóu leikin í Nuuk og í dag fer leikurin á ferð og vitjar millum annað Norðulandahúsið í Havn og Operahúsið í Keypmannahavn.

Framførslan í Nuuk varð upptikin av grønlendskum sjónvarpi og verður í næstum sendur har.